Fíggjarmálaráðið

# Konteringsvegleiðing

Dagført 17. oktober 2011

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • 165 Argir

Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo

# Yvirlit yvir dømi

Vegleiðingin er ætlað sum ein lættur tilgangur til nýtslu av Kontuskipan Kommunana. Farið verður ígjøgnum tær mest vanligu bókingarnar við so einføldum dømum sum til ber. Hetta ritið er ein dagføring av eldri vegleiðng frá 9 marts 2009.

Dømir 1 til 10 eru dømir fyri mest vanligu rakstrarinntøkurnar og -útreiðslurnar, sum ein kommuna hevur. Her verður dentur lagdur á MVG-bókingar, lønarbókingar, skatt og millumrokning millum land og kommunur.

Í dømum 11 til 14 verður farið ígjøgnum dømir fyri hvussu løgur (T.e keyp/søla/gávugevan av fastognum, bilum, maskinum os.fr.) skulu bókast. Av tí at tað almenna útreiðsluførir løgur beinanvegin - men at kortini er neyðugt, at fastognir verða skrásettar í bókhaldinum - verða løgur og fastognir hjá tí almenna bókaðar øðrvísi, enn tær verða í vinnuligum roknskapum. Víst vera dømir fyri, hvussu løgur skulu skrásetast við nýskráseting, við keyp ella sølu, og tá tær verða latnar sum stuðul.

Dømir 15 til 17 vísa, hvussu lán verða bókað hjá kommunum.

Dømini í hesu vegleiðing skulu einans fatast sum ein lættatkomlig innføring í, hvussu kommunur bókað. Tann alment galdandi konteringsvegleiðingin er her: [http://kontuskipan.fsl-domain.fo/ks/ks_view.asp?scope=K](http://kontuskipan.fsl-domain.fo/ks/ks_view.asp?scope=K).


**1 Útreiðslur við MVG: partvíst frítikin fyri MVG (75% frítikin)** ..... 4

**2 Útreiðslur við MVG-skyldugum virksemi (0% frítikin)** ..... 5

**3 Rakstrarinntøka, MVG-skyldug** ..... 6

**4 Uppgerð av MVG-skyldugum virksemi (083x)** ..... 7

**5 Rakstrarinntøka: avseting móti tapi** ..... 8

**6 Rakstrarinntøka: Avsett upphædd partvíst inngoldin og partvíst avskrivað** ..... 9

**7 Lønarútreiðslur** ..... 10

**8 Lønarútreiðslur í smb. við barsilsfarloyvi** ..... 11

**9 Skattur: Bóking av skatti** ..... 12

10 **Skattur: Avrokning av skatti og millumrokningum við landið** ..... 13
11 **Skráseting av materiellum og ómateriellum ognum** ..... 14
12 **Løguútreiðslur** ..... 15
13 **Løguinntøkur** ..... 16
14 **Latan av fastogn sum stuðul** ..... 17
15 **Lán: upptøka av láni** ..... 18
16 **Lán: afturgjald av láni** ..... 19
17 **Lán: primoflytingar** ..... 20

# 1 Útreiðslur við MVG: partvíst frítikin fyri MVG (75% frítikin)

## Rakstur

**1469 Keyp av vørum annars**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1a | 800 | | |

**7511 Keyps-mvg**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1a | 200 | | |

**7598 Endurrindan av keyps-mvg kommunur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | 150 | 2a |

## Fíggjarstøða

### Ogn

**0426 Banka- og giro-kontur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | 1.000 | 3b |

### Eginpeningur og skuld

**0819 Skuld, sum er greidd til útgjaldingar, ymsar skipanir**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | 1.000 | 1b |
| 3a | 1.000 | | |

**0364 MVG-endurgjald frá landinum**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2b | 150 | | |

Vit hava eina vanliga rakstrarútreiðslu fyri kr. 1.000, harav 200 kr. er MVG. Í hesum førinum fáa vit endurrindað 75% av meirvirðisgjaldinum:

1a-1b: [1469 Keyp av vørum annars] og [7511 Keyps-mvg] verða debiterað við ávikavist kr 800 og kr 200 (1a), og stuttfreistað skuld undir [0819 Skuld, sum er greidd til útgjaldingar, ymsar skipanir] verður krediterað við fullari upphædd (1b).

2a-2b: Samstundis verður [7598 Endurrindan av keyps-mvg kommunur] krediterað við 75% av mvg-upphæddini (2a), og konta [0364 MVG-endurgjald frá landinum] verður debiterað við somu upphædd (2b).

3a-3b: Tá rokningin skal gjaldast, skal 0819 debiterast (nullstillast) (3a), og [0426 Banka- og girokontur] skal krediterast (skuldskrivast) (3b).

# 2 Útreiðslur við MVG-skyldugum virksemi (0% frítikin)




Vit hava eina vanliga rakstrarútreiðslu fyri kr. 1.000. Í hesum førinum eru vit mvg-skyldug við fullari upphædd:

1a-1b: [1469 Keyp av vørum annars] og [0831 Inngangandi MVG rakstur (keyps-MVG-rakstur)] verða debiterað við ávikavist kr. 800 og kr. 200 (1a), og stuttfreistað skuld undir [0819 Skuld, sum er greidd til útgjaldingar, ymsar skipanir] verður krediterað við fullari upphædd (1b).

2a-2b: Tá rokningin verður goldin, skal 0819 debiterast (nullstillast) (2a) og [0426 Banka- og girokontur] skal krediterast (skuldskrivast) (2b).

Eru vit fult ella partvíst frítikin fyri meirvirðisgjaldið, skal hetta bókast á [7511 Keyps-mvg], og hin parturin av meirvirðisgjaldinum skal bókast á rakstrarkontuna. Eru vit mvg-skyldug, skal meirvirðisgjaldið bókast á [0831 Inngangandi MVG-rakstur], [0832 Inngangandi MVG-íløgur] ella [0833 Útgangandi MVG (Sølu-MVG)].

# 3 Rakstrarinntøka, MVG-skyldug

## Rakstur

2181 Vørusøla til privat

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| | | 8.000 | 1a |

## Fíggjarstøða

### Ogn

0426 Banka- og giro-kontur

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| 2a | 10.000 | | |

0322 Tænastu- og vøruskuldarar o.t.

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| 1b | 10.000 | | |
| | | 10.000 | 2b |

### Eginpeningur og skuld

0833 Sølu-MVG

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| | | 2.000 | 1a |

Vit hava veitt eina tænastu fyri kr. 10.000, sum er mvg-skyldug:

1a-1b: [2181 Vørusøla til privat] og [0833 Útgangandi MVG (sølu-MVG)] verða krediterað við ávikavist kr. 8.000 og kr. 2.000 (1a), og áognin undir [0322 Tænastu- og vøruskuldarar o.t.] verður debiterað samstundis við fullari upphædd (1b).

2a-2b: Tá peningurin er goldin, verður bankkontan undir kontu 0426 debiterað (góðskrivað) við kr. 10.000 (2a), og áognin undir kontu 0322 verður minkað, somuleiðis við kr. 10.000 (2b).

# 4 Uppgerð av MVG-skyldugum virksemi (083x)

**Rakstur** | **Fíggjarstøða**




Vit hava havt nakrar vanligar rakstrarútreiðslur, íløgur og veitt onkra tænastu, og gera nú uppgerð fyri vinnuligt MVG.

1a-1c: Saldurnar á 0831 (1a), 0832 (1b), 0833 (1c) eru vorðnar ávikavist kr. 4.000, kr. 1.500, kr. og 2.750 við enda av avrokningarskeiðnum.

Avgjaldsskeiðið er runnið, og verða saldurnar á 0831, 0832 og 0833 nú nullstillaðar og fluttar á [0834 Avrokning MVG]. MVG verður síðan gjørt upp mótvegis TAKS. Ein positiv uppgerð merkir, at TAKS skal rindast MVG, meðan ein negativ uppgerð merkir, at TAKS endurrindar MVG.

2a-2d: Ein samanteljing av saldunum á ávikavist 0831 (1a), 0832 (1b) og 0833 (1c) verður bókað á 0834 (2d), samstundis sum tær tríggjar mvg-konturnar verða nullstillaðar (2a-2c). Avrokningin endaði í debet (positivt), og skal TAKS sostatt endurrinda eina upphædd á kr. 2.750.

3a-3b: Tá MVG-afturberingin er inngoldin, verða MVG-konturnar nullstillaðar (3a-3b).

# 5 Rakstrarinntøka: avseting móti tapi

## Rakstur

2181 Vørusøla til privat
(8.000)

1740 Rakstrar-avskrivingar
1a 8.000

## Fíggjarstøða

### Ogn

0426 Banka- og giro-kontur

0322 Tænastu- og vøruskuldarar o.t.
(10.000)

0329 Avseting móti tapi
8.000 1b

### Eginpeningur og skuld

0833 Sølu-MVG
(2.000)

Virkið, vit hava veitt eina mvg-skylduga tænastu fyri kr. 10.000, er nú farið undir avtøku. Útlitini til, at rokningin verður goldin við fullari upphædd, eru rættuliga vánalig, og velja vit sostatt at avseta móti tap av kravinum:

1a-1b: Upphæddin á rakstrarinntøkuni (kr. 8.000) verður debiterað undir [1740 Rakstraravskrivingar] (1a) og krediterað undir áognina [0329 Avseting móti tapi] (1b).

Vit hava avsett, men vit hava ikki slept kravinum. Tá vit avseta, verður ikki nortið við sølu-MVG'ið.

# 6 Rakstrarinntøka: Avsett upphædd partvíst inngoldin og partvíst avskrivað

## Rakstur

**2110 Vørusøla til privat**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | 8.000 | |

**1740 Rakstrar-avskrivingar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | 8.000 | | |
| | | 5.000 | 2b |
| | | 3.000 | 3b |
| 4b | 4.000 | | |

## Fíggjarstøða

### Ogn

**0426 Banka- og giro-kontur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1a | 5.000 | | |

**0322 Tænastu- og vøruskuldarar o.t.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | 10.000 | | |
| | | 5.000 | 1b |
| | | 5.000 | 4a |

**0329 Avseting móti tapi**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | 8.000 | |
| 2a | 5.000 | | |
| 3a | 3.000 | | |

### Eginpeningur og skuld

**0833 Sølu-MVG**

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | 2.000 | |
| 4b | 1.000 | | |

Vit hava avsett ímóti einum kravi fyri fulla upphædd, men sleptu ongantíð kravinum. Búgvið er nú gjørt upp, og vit hava fingið kr. 5.000 á bók í dividendu fyri kravið.

1a-1b: Bankkontan undir kontu 0426 verður debiterað (góðskrivað) við kr. 5.000 (1a), og áognin mótvegis debitor verður minkað undir kontu 0322 við kr. 5.000 (1b).

2a-2b: Avseting móti tapi, konta 0329, verður debeterað við kr. 5.000 (2a), og konta 1740 verður krediterað við kr. 5.000 (2b).

3a-3b: Avseting móti tapi verður nullstillað við at debitera kontu 0329 (3a) og við at kreditera kontu 1740 við kr. 3.000 (3b).

4a-4b: Har standa framvegis kr. 5.000 eftir sum áogn undir 0322. Áognin verður avskrivað við at konta 0322 verður krediterað (4a), meðan konta 1740 og konta 0833 verða debeteraðar við ávikavist kr. 4.000 og kr. 1.000 (4b).

Konta [1740 Rakstraravskrivingar] verður sostatt nýtt til bæði avskriving og avseting ímóti tapi.

# 7 Lønarútreiðslur

## Rakstur

**1110 Mánaðarlønt**

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| 1a | 20.000 | | |

**1160 Arbeiðsmark-naðargjøld**

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| 2a | 200 | | |
| 2a | 350 | | |
| 2a | 125 | | |

**1170 Eftirlønir**

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| 3a | 2.650 | | |

## Fíggjarstøða

### Ogn

**0426 Banka- og giro-kontur**

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| | | 22.650 | 4a |

### Eginpeningur og skuld

**0643 Fyribilsbókingar og millumrokningar**

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| | | 20.000 | 1b |
| | | 2.650 | 3b |
| 4b | 22.650 | | |

**0888 Skuld, annað**

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| | | 675 | 2b |

Vit hava eina mánaðarliga lønarútreiðslu á kr. 20.000. Har til er eisini eitt ALS-gjald á kr. 200, eitt arbeiðsmarknaðargjald á kr. 350, eitt barsilsgjald á kr. 125, eitt tryggingargjald á kr. 400 og eitt eftirlønargjald á kr. 2.250.

1a-1c: [1110 Løn, mánaðarlønt] verður debiterað við kr. 20.000 (1a). Lønarparturin verður krediteraður á kontu [0643 Fyribilsbókingar og millumrokningar], til útgoldið verður (1b)

2a-2b: Gjald fyri ALS, AMEG og barsil verður debiterað á kontu [1160 Arbeiðsmarknaðar-gjøld] (2a). Konta [0888 Skuld, annað] verður kreditерað við upphæddunum frá arbeiðsmarknaðargjøldum, samanlagt kr. 675 (2b).

3a-3b: Eftirlønin á kr. 2.650 verður debeterað á kontu [1170 Eftirlønir] (3a), og avstemningskontan [0643 Fyribilsbókingar og millumrokningar] verður kreditерað við somu upphædd (3b).

4a-4b: Lønin verður útgoldin við at cleara [0643 Fyribilsbókingar og millumrokningar].

Í hesum døminum varð lønin goldin beinleiðis út. Men skal lønin onkursvegna bíða, skal hon bókast undir kontu [0819 Skuld, sum er greidd til útgjaldingar, ymsar skipanir] í kredit. Leggið til merkis, at lønarskipanir eru kompleksar, og kunnu bókingarnar víkja frá tí her vísta.

# 8 Lønarútreiðslur í smb. við barsilsfarloyvi

## Rakstur

**1110 Mánaðarlønt**

| Debet | Kredit |
|---|---|
| (20.000) | |

**1160 Arbeiðsmark-naðargjøld**

| Debet | Kredit |
|---|---|
| (675) | |

**1170 Eftirlønir**

| Debet | Kredit |
|---|---|
| (2.650) | |

**1180 Endurgjald í samband við løn**

| Debet | Kredit |
|---|---|
| | 19.500 1b |

## Fíggjarstøða

### Ogn

**0426 Banka- og giro-kontur**

| Debet | Kredit |
|---|---|
| | (22.650) |
| 1a 19.500 | |

### Eginpeningur og skuld

**0643 Fyribilsbókingar og millumrokningar**

| Debet | Kredit |
|---|---|
| (22.650) | (22.650) |

**0888 Skuld, annað**

| Debet | Kredit |
|---|---|
| | (675) |

Lønmóttakarin er farin í barsilsfarloyvi. Lønarbókingarnar halda áfram sum vanligt, og frá barsilsskipanini móttaka vit eitt mánaðarligt endurgjald á kr. 19.500.

1a-1b: Bankakontan undir kontu 0426 verður debiterað við kr. 19.500 (1a) og kontan [1180 Endurgjald í samband við løn] verður krediterað við kr. 19.500 (1b).

# 9 Skattur: Bóking av skatti

## Rakstur

**6180 Fluttur skattur**

| | | |
|---|---|---|
| | 12 mió. | 1a |

## Fíggjarstøða

### Ogn

**0330 Persónsskattur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1b | 12 mió. | | |
| | | 10 mió. | 2a |

**0365 Kommunuavrokning**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2b | 10 mió. | | |
| | | 10 mió. | 3a |

**0426 Banka- og girokontur**

| | | |
|---|---|---|
| 3b | 10 mió. | |

### Eginpeningur og skuld

Vit hava eina skattaálíkning á 12 mió. kr., harav 10 mió. kr. verða avroknaðar.

1a-1b: [6180 Fluttur skattur] verða krediterað fyri álíkningina 12 mió. kr. (1a), og [0330 Persónsskattur] verður debiterað við somu upphædd (1b). Leggið til merkis, at álíkningin (ikki avrokningin!) er inntøkan.

2a-2b: Tá avrokningin er gjørd upp, verður avroknaða upphæddin á 10 mió. kr. flutt frá [0330 Persónsskattur] (2a) til [0365 Kommunuavrokning] (2b). Munurin millum álíkning og avrokning á 2 mió. kr. verður standandi sum ein áogn á [0330 Persónsskattur], til upphæddin verður avroknað.

3a-3b: Tá peningurin er komin frá gjaldstovuni, verður [0365 Kommunuavrokning] krediterað (3a), og [0426 Banka- og girokontur] debiterað (3b).

Leggið serliga til merkis, at avrokningin fer fram umvegis [0365 Kommunuavrokning], heldur enn at fara beinleiðis inn á bankakontuna. Hetta verður gjørt, tí aðrar millumrokningar eru millum land og kommunu, sí næsta dømið.

# 10 Skattur: Avrokning av skatti, millumrokningum við landið, og 75%-meirvirðisgjald

## Rakstur

**6180 Fluttur skattur**

| Debet | Kredit |
|---|---|
| 12 mió. | |

**7310 flyting til landið**

| | Debet | Kredit |
|---|---|---|
| 2a | 1 mió. | |

## Fíggjarstøða

### Ogn

**0330 Persónsskattur**

| Debet | Kredit | |
|---|---|---|
| 12 mió. | | |
| | 10 mió. | 1a |

**0365 Kommunuavrokning**

| | Debet | Kredit | |
|---|---|---|---|
| 1b | 10 mió. | | |
| | | 1 mió. | 2b |
| 3b | 0,5 mió. | | |
| | | 9,5 mió. | 4a |

**0426 Banka- og giro-kontur**

| | Debet | Kredit |
|---|---|---|
| 4b | 9,5 mió. | |

**0364 MVG-endurrindan frá landinum**

| Debet | Kredit | |
|---|---|---|
| 0,5 mió. | | |
| | 0,5 mió. | 3a |

Vit hava sum áður eina skattaálíkning á 12 mió. kr., harav 10 mió. kr. verða avroknaðar, men 1 mió. kr. skal flytast til landið vegna musikkskúla, og 0,5 mió. kr. verður afturborið fyri kommunu-MVG.

1a-1b: Avroknaði persónsskatturin verður fluttur frá [0330 Persónsskattinum] (1a) til [0365 Kommunuavrokning] (1b) sum vanligt.

2a-2b: 1 mió. kr. verða mótroknaðar fyri musikkskúlan (2a-2b).

3a-3b: Kommunan fær 0,5 mió. kr. í MVG-endurrindan (sí dømi 1), sum verður bókað frá [0364 MVG-endurrindan frá landinum] til [0365 Kommunuavrokning].

4a-4b: Tá inngoldið hevur verið, verður [0365 Kommuuavrokning] krediterað (3a) og [0426 Banka- og girokontur] debiterað (3b) við goldnu nettoupphæddini á 9,5 mió.

# 11 Skráseting av materiellum og ómateriellum ognum




Komið er fram á, at eini hús (og samanhoyrandi grundstykki), sum kommunan eigur, ikki er skrásett í bókhaldsskipanini. Grundstykkið verður virðissett til upprunavirðið 0,5 mió. kr. og bygningurin til 1 mió. kr., og hevur bygningurin avskrivingar fyri 0,3 mió. kr.

1a-1d: Grundstykkið verður skrásett á [0121 Jørð] við 0,5 mió. kr., og mótbókað verður á [0532 Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)].

2a-2b: Sjálvt húsið verður skrásett á [0131 Jørð] við 1 mió. kr., og mótbókað verður á [0532 Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)].

3a-3d: Samantaldar avskrivingar av bygninginum á 0,3 mió. kr. verða krediteraðar á [0139 Samantaldar avskrivingar – bygningar o.t.] og debeteraðar á [3291 Avskrivingar ] (3a-3b). Samstundis verður sama upphædd debeterað á [0532 Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)] og krediterað á [3299 Mótk. til 3291] (3c-3d).

Leggið merki til, at slík skráseting av ognum ikki ávirkar úrslitið (yvirskot/undirskot), tí at skrásett verður við netto nul bæði á fíggjarstøðu og rakstri.

Samanber annars við løguútreiðslur og –inntøkur í dømi 12 og 13 niðanfyri.

# 12 Løguútreiðslur

## Rakstur

**3132 Bygningar, alment**

| | | |
|---|---|---|
| 1a | 20 mió. | |
| 2d | 10 mió. | |

**1112 Løn, tímalønt**

| | | |
|---|---|---|
| 2a | 10 mió. | |

**1910 Frádráttir fyri løguløn**

| | | |
|---|---|---|
| | 10 mió. | 2c |

## Fíggjarstøða

### Ogn

**0426 Banka- og giro-kontur**

| | | |
|---|---|---|
| | 20 mió. | 1b |
| | 10 mió. | 2b |

**0131 Bygningar**

| | | |
|---|---|---|
| 3a | 30 mió. kr. | |

### Eginpeningur og skuld

**0532 Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)**

| | | |
|---|---|---|
| | 30 mió. | 3b |

Vit hava bygt ein bygning fyri 30 mió. kr., harav 10 mió. kr. er løn hjá egnum arbeiðsfólki, og restin er entreprenørrokningar o.tíl. (sæð verður burtur frá MVG, eftirlønum v.m., kreditorkontur í døminum).

1a-1b: Entreprenørrokningarnar á 20 mió. kr. verða bókaðar beinleiðis á kontu [3132 bygningar, alment] (1a). og konta [0426 Banka- og girokontur] verður debeterað tilsvarandi.

2a-2d: Lønirnar verða í fysta umfari bókaðar sum vanligt (2a-2b). Fyri at løguupphæddin á 3132 ikki skal ávirkast av, um vit brúka egna ella fremmanda arbeðsmegi, verður lønarútreiðslan “flutt” frá høvuðsslagi 1 til høvuðsslag 3 yvir kontu [1910 Frádráttir fyri løguløn] (2c-2d). Leggið til merkis, at valdi hátturin ger, at standardkonta 11 enn vísir lønarútreiðslurnar, hóast útreiðslan verður flutt frá høvuðsslagi 1.

Hóast tað almenna útreiðsluførir allar útreiðslur beinanvegin, skulu ognir skrásetast á fíggjarstøðuni í bókhaldskipanini. Hetta verður fyri anleggsútbúnað gjørt við at skráseta á standardkontu [01 Immateriellur og matriellur útbúnaður] og mótbóka á standardroknskaparkontu [0532 Útjavningarkonta]:

3a-3b: Í hesum førinum verður fastognin skrásett á [0131 Bygningar] (2a), og mótbókað verður á [0532 Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)].

Eftir at bygningurin er tikin í nýtslu, verður hann avskrivaður sambært avskrivingarreglunum. Avskrivingarhátturin í dømi 11 omanfyri verður tá nýttur.

# 13 Løguinntøkur

## Rakstur

**4230 Bygningar**

| | |
|---|---|
| | 30 mió. 1b |

**5310 Stuðul til vinnu**

| | |
|---|---|
| 1c 5 mió. | |

**3291 Avskrivingar**

| | |
|---|---|
| | 5 mió. 3b |

**3299 Mótkonta til 3291**

| | |
|---|---|
| 3c 5 mió. | |

## Fíggjarstøða

### Ogn

**0426 Banka- og giro-kontur**

| | |
|---|---|
| 1a 25 mió. | |

**0131 Bygningar**

| | |
|---|---|
| (30 mió.) | 30 mió. 2a |

**0139 Samantaldar avskrivingar – bygningar o.t.**

| | |
|---|---|
| 3a 5 mió. | (5 mió.) |

### Eginpeningur og skuld

**0532 Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)**

| | |
|---|---|
| (25 mió.) | |
| 2b 30 mió. | 5 mió. 3d |

Bygningurin, sum vit hava bygt fyri 30 mió. kr., verður nøkur ár seinni seldur til vinnufyritøku fyri 25 mó. kr.. Bygningurin er avskrivaður við 5 mió. kr., tá ið hann verður seldur.

Tað týdningarmesta í mun til løguinntøkur er, at tað er ikki nøktandi bara at hava ein sølupris, men vit mugu eisini vita, hvønn kostnað vit sjálvi keyptu løguna fyri.

1a-1c: Konta [0426 Banka- og girokontur] verður debiterað við kr. 25 mió. (1a). Mótbókað verður við, at [4230 bygningar] verður krediterað við fullum kostprísi av bygninginum, t.e. 30 mió. kr.(1b), og munurin á 5 mió. kr. millum kostprís og sølupris verður bókaður sum stuðul á [5310 stuðul til vinnu] (1c).

2a-2b: Tá bygningurin er seldur, skal hann takast úr fíggjarstøðuni. Konta [0131 Bygningar] verður tí krediterað við 30 mió. kr. (1a), og [0532 Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)] verður debeterað við somu upphædd.

3a-3d: Avskrivingar verða strikaðar á [0139 Samantaldar avskrivingar – bygningar o.t.] og [3291 Avskrivingar ] (3a-3b). Tilsvarandi verður mótbókingarnar til avskrivingina førdar aftur við at debitera á [3299 Mótkonta til 3291] og kreditera [0532 Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)] (3c-3d).

Avskrivingar (bókingar 3a-3d) verða oftast gjørdar sjálvvirkandi av skipanini til ognarskráseting, tá bóking 2a-2b verður gjørd. Bókhaldarin bókar tá ikki avskrivingina manuelt.

# 14 Latan av fastogn sum stuðul

## Rakstur

4210 Jørð, grunddøki o.t.

| Debet | Kredit |
|---|---|
| | 5 mió. 1c |

5510 Íløgustuðul

| Debet | Kredit |
|---|---|
| 1a 5 mió. | |

## Fíggjarstøða

### Ogn

0643 Fyribilsbókingar og millumrokningar

| Debet | Kredit |
|---|---|
| 1b 5 mió. | |
| | 5 mió. 1d |

0121 Jørð, grunddøki o.tíl.

| Debet | Kredit |
|---|---|
| (5 mió.) | 5 mió. 2a |

### Eginpeningur og skuld

0532 Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)

| Debet | Kredit |
|---|---|
| 2b 5 mió. kr. | (5 mió.) |

Kommunan letur eitt lendi sum stuðul til ítróttarfelag, tí ítróttarfelagið vil byggja ein fótbóltsvøll. Lendið er skrásett við 5 mió. kr. Avskrivað verður ikki á jørð og lendi.

1a-1d: Konta [5510 Íløgustuðul] verður debiterað við kr. 5 mió. (1a). Mótbókað verður við, at [0643 Fyribilsbókingar og millumrokningar ] verður debiteraðvið somu upphædd, t.e. 5 mió. kr.

Samstundis verður krediterað 5 mió. á [4210 Jørð, grunddøki o.t.] (1c) og mótbókað á [0643 Fyribilsbókingar og millumrokningar ].

2a-2b: Tá lendið er latið, skal tað takast úr fíggjarstøðuni. Konta [0121Jørð] verður tí krediterað fyri 5 mió. kr. (1a) og [0532 Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)] verður debeterað við somu upphædd (2b).

Bókingin í 2a-b2 krevur sjálvsagt, at lendið frammanundan er bókað við 5 mió. kr. í bókhaldsskipanini. Um tað ikki frammanundan er skrásett, skal lendið fyrst skrásetast (sí dømi 1), og síðani bókast út úr í bókhaldsskipanini eins og í hesum døminum.

Leggið merki til, at latan av materiellum og ómateriellum ognum (STKT 01 í kontuskipanini) ávirkar fíggjarætlan og roknskap við 0 kr. Hetta er avleiðing av, at keyp og søla av hesum ognum er inntøka og útreiðsla, sí dømi 2 og 3. Hóast slíkur stuðul ávirkar roknskap við 0 kr, so vísir dømið, at stuðulin skal bókast og vísast í roknskapinum.

# 15 Lán: upptøka av láni

## Rakstur

1479 Keyp av tæn-astuvetingum annars

1c 10.000 |

5730 Rentur av innanl. skuld, ið eru goldnar

## Fíggjarstøða

**Ogn**

0426 Banka- og giro-kontur

1a 990.000 |

**Eginpeningur og skuld**

0730 Innanlanda-skuld, primo

0731 Innanlands-skuld, upptøka

| 1.000.000 1b

0732 Innanlanda--skuld, afturgjald

Vit hava tikið eitt lán á kr. 1.000.000 frá føroyskum lánveitara, har rentan er 5% pro anno, kostnaðurin er á kr. 10.000 og leypitíðin er 10 ár.

1a-1b: Bankakontan undir kontu 0426 verður debeterað við kr. 990.000 (1a), kontan [0731 innanlandsskuld, upptøka] verður krediterað við kr. 1.000.000 (1b), meðan kostnaðurin á kr. 10.000 verður debeteraður á kontu [1479 Keyp av tænastuvetingum annars] (1c).

Lán v.m. skal síggjast aftur í rakstrinum í einum RLÚ-roknskapi á § 25 í roknskapinum. Hetta verður tó bara gjørt í landsroknskapinum. Sostatt verður á gjaldstovuni (men ikki kommununi) kontan [8731 innanlandsskuld, upptøka] krediterað við kr. 1.000.000 og konta [8799 Mótkonta til bókingar á standardkontu 87] verður debeterað við kr. 1.000.000.

# 16 Lán: afturgjald av láni

## Rakstur

1479 Keyp av tæn-astuvetingum annars

| Debet | Kredit |
|---|---|
| (10.000) | |

5730 Rentur av innanl. skuld, ið eru goldnar

| Debet | Kredit |
|---|---|
| 2a 50.000 | |

## Fíggjarstøða

### Ogn

0426 Banka- og giro-kontur

| Debet | Kredit |
|---|---|
| (990.000) | |
| | 150.000 1a |

### Eginpeningur og skuld

0730 Innanlands-skuld, primo

| Debet | Kredit |
|---|---|
| | |

0731 Innanlands-skuld, upptøka

| Debet | Kredit |
|---|---|
| | (1.000.000) |

0732 Innanlands-skuld, afturgjald

| Debet | Kredit |
|---|---|
| 1b 150.000 | |
| | 50.000 2b |

Vit rinda kr. 150.000 aftur fyrsta árið, og rentukontan verður skuldskrivað fyri kr. 50.000 fyri rentukostnað.

1a-1b: So hvørt gjaldingin fer fram, verður [0732 innanlandsskuld, afturgjald] debeterað, meðan bankakontan [0426 Banka- og girokontur] verður krediterað við somu upphædd.

2a-bb: Tá rentan er tilskrivað, verður konta [5730 Rentur av innanlandsskuld, ið eru goldnar] debeterað við kr. 50.000 (2a) og [0732 Innanlandskuld, afturgjald] verður krediterað (2b).

2a-2d: Eins og áðrenn, so skulu rørslurnar síggjast aftur á RLÚ-roknskapinum. Sostatt verður hjá Gjaldstovuni (men ikki í bókhaldinum hjá einstøku kommununi) bókað [8332 innanlandsskuld, afturgjald] við at debetera kr. 100.000, og mótkontan 8399 verður krediterað við kr. 100.000.

# 17 Lán: primoflytingar

## Rakstur

| 1479 Keyp av tæn-astuvetingum annars | |
|---|---|
| (10.000) | |

| 5730 Rentur av innanl. skuld, ið eru goldnar | |
|---|---|
| (50.000) | |

## Fíggjarstøða

### Ogn

| 0426 Banka- og giro-kontur | |
|---|---|
| (990.000) | |
| | (150.000) |

### Eginpeningur og skuld

| 0730 Innanlands-skuld, primo | |
|---|---|
| | 900.000 1c |

| 0732 Innanlands-skuld, afturgjald | |
|---|---|
| (100.000) | |
| | 100.000 1b |

| 0724 Innanl.skuld, broytingar í tíð. rentu | |
|---|---|
| | |

| 0731 Innanlands-skuld, upptøka | |
|---|---|
| | (1.000.000) |
| 1a 1.000.000 | |

| 0723 Kreditfelags-skuld, ymiskt | |
|---|---|
| | |

Saldan á kontu [0730 Innanlandsskuld, primo] verður dagførd (nullstillað) við ársenda (tíðarskeið 15); ein sokallað “primoflyting”. Saldan á kontuni er samtalið fyri konturnar undir 073x ultimo árið fyri.

1a-1c: Konta 0731 verður debeterað (nullstillað) við kr. 1.000.000 (1a), og konta 0732 verður somuleiðis krediterað (nullstillað) við kr. 100.000 (1b). At enda verður [0730 Innanlandsskuld, primo] krediterað (mótkonterað) við kr. 900.000 (1c). Saldan á 0730 er sostatt nú primosaldan fyri lánið.